**Jørgen Niclasen**
**landsstýrismaður**

**Svar upp á fyrispurning nr. 26/2014 eftir § 52a í tingskipanini frá Gunvør Balle, løgtingskvinnu, um starvið sum skúlastjóri í Vesturskúlanum**

Fyrispurningurin er soljóðandi

1. Nær ætlar landsstýrismaðurin at lýsa eftir stjóra til nýggja Vesturskúlan?

2. Um starvið ikki verður sett pr. 1. januar 2015, hvør er so ætlanin við skúlaleiðsluni á Venjingarskúlanum eftir 1. januar?

**Svar**

Venjingarskúlin og Kommunuskúlin verða lagdir saman tann 1. januar 2015. Vegna ógegni í Mentamálaráðnum hevur løgmaður lagt málið til Fíggjarmálaráðið.

Tað, sum Fíggjarmálaráðið skal taka støðu til, er:
*"Skal starvið sum skúlastjóri á samanlagda skúlanum, Vesturskúlanum, verða lýst leyst at søkja, ella ber tað til at seta verandi skúlastjóra í Kommunuskúlanum sum skúlastjóra í Vesturskúlanum".*

Fíggjarmálaráðið arbeiðir við málinum, og verður avgerð tikin fyrsta dagin. Tá ber til at svara hesum spurningum.

Fíggjarmálaráðið, 5. Desember 2014

Jørgen Niclasen
landsstýrismaður

Kvíggjartún 1 • Postsmoga 2039 • FO-165 Argir
Telefon 35 20 20 • Telefax 35 20 25 • E-mail: fmr@fmr.fo